## Rúsevni og vandamiklir lutir

Á Psykiatriska deplinum verður kravt, at fólk eru edrú, og tað verður ikki góðtikið at hava uppi á sær, keypa ella selja rúsevni á sjúkrahúsøkinum.

Er grundaður illgruni um, at sjúklingur hevur egnan heilivág, rúsevni ella vandamiklar lutir hjá sær, verður hann kunnaður um tað, og yvirlæknin kann taka sær rætt til at avgera, at sjúklingastovan og ognarlutirnir hjá sjúklinginum verða kannaðir ( í sjúklingastovuni). Somuleiðis kann yvirlæknin verða noyddur at krevja kropsvisitatión, landroynd ella at blást verður í alkometur.

Av trygdarávum kunnu sjúklingar ikki hava lutir hjá sær, ið kunnu vera til vanda fyri nakran. Tá ein verður innlagdur ella fluttur á afturlatnu deild, verða ognarlutirnir tí kannaðir (á sjúklingastovuni). Verða lutirnir mettir at kunna vera til vanda, verða teir latnir til starvsfólkið í varðveitslu.

Yvirlæknin kann avgera, at hald verður lagt á funnan heilivág, rúsevni ella vandamiklar lutir.

Verður mett at lutir eru í stríð við lóggávuna, kann vera neyðugt at lata løgregluna avgera hetta.

## Myndatøka

Við atliti til trygdina hjá sjúklingum og avvarðandi verða ikki tiknar myndir ella gjørdar videoupptøkur á psykiatrisku deildunum.

## Virðislutir/peningur

Frárátt verður sjúklingum at hava við sær størri peningaupphæddir ella virðislutir (t.d. ur ella smykkur) við innleggjan, við tað at Psykiatriski depilin ikki kann taka ábyrgd av møguligum missi ella skaða.

Deildin kann áseta serligar reglur fyri goymslu av peningi ella virðislutum.

## Handil og umbýti millum sjúklingar:

Undir innleggjan verður ikki selt ella býtt um sínámillum.

## Royking og opin eldur:

Psykiatriski depilin er roykfrítt umráði.

Tó eru ávís roykirúm á onkrari psykiatriski deild undantikin.

Av trygdarávum verður opin eldur, kertuljós, bikarljós ella líknandi ikki nýtt á psykiatriska deplinum.

***Á deildunum kunnu verða ásettar aðrar mannagongdir um onnur viðurskifti, og víst verður til kunningarfaldarar frá teim einstøku deildunum, sum sjúklingurin eisini fær við innleggjan.***

**Depilsleiðslan** **Psykiatriski depilin**

**Septembur 2013**

# Trivnaðarreglur

**PSYKIATRISKI DEPILIN**

# Mannagongdir á deildunum

## - við atliti til viðgerð, trivnað og trygd hjá tí einstaka

*Sambært psykiatrilógini frá 01.10. 09 verður ásett, at sjúklingar við innleggjan verða kunnaðir um galdandi mannagongdir, sum skulu tryggja sjúklingum og starvsfólki bestu umstøður.*

*Tá fleiri eru savnað á einum stað, er neyðugt at hugsa út frá tí einstaka. Mannagongdirnar kunnu tí tykjast avmarkandi í mun til ynskir og vanar hjá onkrum sjúklingi, men kunnu vera neyðugar fyri viðgerðina, trivnaðin og trygdina hjá tí einstaka.*

## Telefon / Telda

Undir vanligum umstøðum brúka sjúklingar egnu fartelefon/teldu á deildini og hava atgongd til mynttelefon. Yvirlæknin kann tó í serligum førum verða noyddur at avmarka atgongdina til telefon/teldu hjá *onkrum* sjúklingi, um mett verður, at sjúklingurin harvið er betri vardur.

Tað kann í ávísum førum vera neyðugt at goyma mynttelefonina heilt burtur. Í slíkum førum fáa hinir sjúklingarnir atgongd til telefonina við at venda sær til starvsfólkini.

Sjálvt um tað eru avmarkingar í at brúka telefon/teldu, kann tann einstaki sjúklingurin altíð seta seg í samband við sín advokat, sjúklingavegleiðara ella verja, um slíkur er tilnevndur.

Fyri at verja tey innløgdu verða myndatól ikki nýtt á psykiatrisku deildunum (so sum fartelda/ fartelefon/ipad o.a.)

## Postur

Sjúklingar hava í høvuðsheitum rætt til at senda og móttaka brøv, pakkar og teldupostar.

Yvirlæknin kann tó hjá onkrum verða noyddur at avmarka atgongdina til alnetið við atliti til viðgerðina.

Er grundaður illgruni um, at sjúklingur fær sendandi lutir, ið ikki eru fremjandi í mun til viðgerðina, kann yvirlæknin avgera, at posturin verður latin upp og kannaður. Í slíkum førum verður viðkomandi sjúklingur kunnaður, soleiðis at hann er til staðar, meðan opnað verður.

## Vitjan

Í høvuðsheitum er altíð møguligt hjá avvarðandi at vitja á deildunum, men einstøku deildirnar tilskila sær rætt at áseta vitjunartíðir, soleiðis at virksemið á deildini riggar sum best.

Um børn koma á vitjan, verður hetta avtalað við starvsfólkini, so neyðugar fyrireikingar kunnu gerast.

Yvirlæknin kann við atliti til viðgerðina, trygdina ella trivnaðin á deildini verða noyddur at avmarka ella heilt steðga vitjanum uttanífrá - ella gera av, at starvsfólk eru til staðar undir vitjanini. Av somu orsøkum kunnu vitjandi í ávísum førum verða biðin um at vísa fram innihald í taskum, posum ella øðrum lutum, tey hava við sær. Hetta fer fram inni í vitjunarrúminum.

Í teimum førum har vitjanir og samskifti eru avmarkað, er tað ábyrgdin hjá starvsfólkunum at kunna sjúklingin um síni avvarðandi ella onnur týðandi viðurskifti.

Øvugt verða avvarðandi kunnað um støðuna hjá sjúklinginum.

## At vera til staðar á deildini

Við atliti til viðgerðina eru sjúklingar til staðar á deildini undir innleggingini.

Um ynskt verður at fara av deildini, verður hetta avtalað við starvsfólkini.

Tað kann á afturlætnari deild verða neyðugt, av viðgerðarávum, at avmarka møguleikarnar at fara av deildini.